Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingskvinna

Svarari: Aksel V. Johannesen, løgmaður

Evni: Ríkisrættarliga støða Føroya

Spurningar:

1. Hvussu gongur við arbeiðinum viðvíkjandi ríkisrættarligu støðu Føroya?
2. Væntar løgmaður, at ein niðurstøða fæst áðrenn ríkisfundin, sum verður í summar?

Viðmerkingar
Tað vóru góð tíðindi, tá løgmaður kallaði allar flokkar inn til fundar at viðgera ríkisrættarligu støðu Føroya fyrr í ár. Forfólk í teimum føroysku flokkunum vóru alment frammi um, at nú mátti okkurt gerast, tí støðan serliga á uttanríkispolitiska økinum als ikki var nøktandi. Eykasending var í Kringvarpi Føroya um málið, og stevið og viljin til at finna eina semju um at víðka heimildirnar hjá Føroyum og at skipa Føroyar sum eitt sjálvstøðugt land, tóktust ongantíð at vera nærri enn tað sama. Tað skuldi arbeiðast hart og skjótt, tí ætlanin var at leggja eina niðurstøðu fram á ríkisfundinum, sum verður í summar. Men síðan hevur ikki nógv verið at frætta alment um hetta málið, og tí verða hesir spurningar settir løgmanni.

Á Løgtingi, 27. mai 2025

Annika Olsen